Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning frá Djóna Nolsøe Joensen, løgtingsmanni, í løgtingsmáli nr. 50/2019, viðvíkjandi sorgarfarloyvi til foreldur, sum missa barn.

Spurningurin var soljóðandi:

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta í verk sorgarfarloyvi til foreldur, sum missa barn?

Svar:

Tá ið tað syrgiliga hendir, at eitt barn doyr, kunnu foreldur fáa eina sjúkramelding frá læknanum. Ætlanin er ikki at gera eina serstaka skipan á arbeiðsmarknaðinum, sum endurrindar syrgjandi foreldrum lønarmissin, til tey kunnu fara til arbeiðis aftur. Sum grundgeving fyri hesum kann m.a. nevnast,

- at aðrar skipanir (starvsmannalógin, sáttmálar og dagpengaskipanin) longu lofta syrgjandi foreldrum,
- at tað er individuelt, nær foreldur megna at fara til arbeiðis aftur, og tí er tað gott, at ein lækni við jøvnum millumbilum tekur støðu til, hvussu foreldrini hava tað; læknin kann eisini vísa foreldrunum víðari til sálarfrøðing, um mett verður, at tørvur er á tí,
- tað er trupult at seta mark á eina slíka skipan, tí at eitt barn er altíð barnið hjá sínum foreldrum, eisini tá tað er vaksið, og spurnartekin kann eisini setast við, um tað ikki kann vera ein eins stór sorg at missa ein annan kæran, t.d. makan.

Eg meti ikki, at tað er ein slíkur samanhangur millum tað at fáa eitt barn og tað at missa eitt barn, at bæði skulu hoyra undir Barsilsskipanina. Barsilsskipanin er ein væl grundfest skipan, sum m.a. hevur til endamáls, at allir løntakarar í mest møguligan mun fáa endurgjald fyri lønarmiss í sambandi við barnsburð, men eisini at tryggja barninum samveru bæði við móðir og faðir.

Sum víst verður á í viðmerkingunum til fyrispurningin, hava vit í Føroyum eina góða barsilsskipan, sum ger tað møguligt at vera burturi frá arbeiðsmarknaðinum, tá vit fáa børn. Barsilsskipanin rindar eisini barsilspening til teirra, ið fáa deyðfødd børn. Mannagongdin er, at um talan er um eina føðing, so verður barsilspeningur veittur, um treytirnar annars eru loknar fyri at koma undir barsilsskipanina. Tíðarskeiðið, sum barsilsskipanin veitir barsilspening eftir føðing, er 48 vikur. Um barnið doyr í hesum tíðarskeiðinum, fáa foreldrini kortini barsilspening allar 48 vikurnar.

Hendan mannagongdin verður fylgd, hóast greið heimild ikki er fyri henni í barsilslógini. Ætlanin er tó at broyta barsilslógina, soleiðis at greið heimild verður fyri, at útgjald kann verða veitt foreldrum, hvørs barn antin er deyðfødt ella doyr í barsilsfarloyvistíðarskeiðinum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 14. februar 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður